# Eitt samt Fólkating lækkar blokkin

**Allir flokkar í Fólkatinginum taka undir við at lækka blokkstuðulin 366,4 milliónir krónur í ár. Lisbeth L. verður helst einasti fólkatingslimur, sum fer at atkvøða ímóti uppskotinum**

BLOKKLÆKKING
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Danska Fólkatingið fer ikki at seta seg upp ímóti ynskinum hjá Føroya Landsstýrið um at lækka blokkstuðulin 366,4 milliónir krónur í ár. Føroyingar hava yvirtikið fleiri málsøki 1. januar, og tí er tað ein sjálvfylgja, at føroyingar eisini gjalda fyri málsøkini, heldur eitt samt Fólkating.

Uppskotið um at lækka blokkstuðulin fekk ikki nógva rúmd á fundinum hjá Fólkatinginum týskvøldið. Allir framsøgumenn søgdu stutt og greitt, at teir taka undir við uppskotinum.

Ikki óvæntað var Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum tann, sum fegnaðist mest um uppskotið. Fegnaðist um, at hetta fíggjarliga rúsevnið, sum danski staturin hevur pumpað inn í føroyska samfelagið, byrjar at hvørva.



*Tað verður helst bara Lisbeth L. Petersen, sumsum fer at atkvøða ímóti fíggjarlógaruppskotinum hjá nýggju donsku stjórnini*

### Hvar eru fjølmiðlarnir

Tórbjørn Jacobsen hevur áður kallað tað fyri eina søguliga hending, at blokkstuðulin nú verður lækkaður, og hann spurdi millum annað, hvar donsku fjølmiðlarnir eru, nú stuðulin verður lækkaður. Hann vísti á, hvussu ringa viðferð, føroyingar mangan høvdu fingið í donsku fjølmiðlunum í kreppuárunum og helt, at fjølmiðlarnir nú áttu at víst føroyingum eitt sindur av vælvilja.

Tórbjørn Jacobsen tosaði um kreppuna og um, hvussu føroyingar høvdu reist seg úr kreppuni, og segði, at landskassin nú er so væl fyri, at tað letur seg gera at lækka blokkin.

Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum hevði tó eina eitt sindur øðrvísi fatan av tingunum. Hon helt ikki, at landsstýrið hevði verið serliga ábyrgdarfult, og hon kundi ikki fagna uppskotinum á sama hátt sum Tórbjørn Jacobsen.

Sambandsflokkurin er ímóti at lækka blokkin, tí hann heldur, at hetta fer at ganga út yvir vælferðina í Føroyum. Lisbeth L. Petersen verður tí helst einasti fólkatingslimur, sum fer at atkvøða ímóti at lækka blokkin.

### Virða føroysk ynski

Í uppskotinum um at lækka blokkstuðulin stendur, at blokkstuðulin verður ásettur fyri eitt ár í senn. Hetta fekk Tórbjørn Jacobsen at spyrja fíggjarmálaráðharran, Thor Petersen, um tað kann hugsast, at blokkstuðulin hækkar aftur, um eitt nýtt landsstýrið kemur til aftaná løgtingsvalið 30. apríl.

Tórbjørn Jacobsen ákærdi andstøðuna í Føroyum fyri at hava ætlanir um at hækka blokkin aftur, og tí vildi hann hava fíggjarmálaráðharran at siga sær, um hetta er nakað, sum borgarliga stjórnin kann ganga við til.

Men Thor Petersen vildi hvørki vátta ella avsanna, um stjórnin fer at ganga við til, at blokkurin hækkar aftur.

Hann segði, at blokkurin nú er lækkaður, tí hetta var eitt ynski frá landsstýrinum. Útgangsstøðið hjá stjórnini er, at avtalurnar við føroyingar verða gjørdar við virðing fyri tí løgtinginum, sum veljararnir hava valt. Og hetta er eisini galdandi í framtíðini, segði hann.

Sostatt ber ikki til at útiloka, at blokkstuðulin verður settur upp aftur, um eitt tílíkt ynski kemur úr Føroyum, men hetta krevur helst, at føroyingar lata frá sær aftur málsøki, sum longu eru yvirtikin. Og tað er neyvan sannlíkt – sama hvør situr í landsstýrinum.

# Mistøk eru gjørd og vit mugu læra av teimum

**– sigur rektarin á Fróðskaparsetrinum um Menasfrágreiðingina**

SETRIÐ OG MENASFRÁGREIÐING
*Jan Müller*

-Vit hava gjørt mistøk í sambandi við Menasfrágreiðingina men tey verða ikki endurtikin og at siga, at Fróðskaparsetrið er endað í lummanum á einum oljufelag er at taka munnin ov fullan. Tað sigur Malan Marnersdóttur, rektari á Fróðskaparsetri Føroya til tær atifinningar, sum hava verið móti Setrinum í seinastuni. Hon sigur við Útvarpið fríggjadagin, at fígging frá eitt nú oljufeløgum er nakað, sum kann geva Fróðskaparsetrinum ein kærkomnan íblástur.

Hon sigur hetta eftir at fyrrverandi leiðarin á Søgu- og samfelagsdeildini, Jógvan Mørkøre í Sosialinum fríggjdagin finst at mannagongdini í øllum hesum málinum og sigur, at Fróðskaparsetrið eigur ikki at leggja navn til Menas-frágreiðingina.

Malan Marnersdóttur vil ikki siga við Útvarpið, um hon er samd við sínum starvsfelaga í hesum og vil heldur ikki gera viðmerkingar til tað, sum stendur í Menas frágreiðingini, áðrenn hon er komin út. Hon vísir aftur, at arbeiðið ikki er á einum vísindaligum stigi.

-Fróðsskaparsetrið er universitetið í Føroyum og verður fíggjað av landskassanum. Vit hava so tikið henda tjansin sum í fleiri øðrum førum at seta nakrar serligar verkætlanir í verk, tí vit hava fingið stuðul uttanífrá, og tað eru verkætlanir, sum eru orðaðar og fyrireikaðar her, og har arbeiðið verður gjørt á Setrinum. Tað er eingin, sum sigur ella bíleggur frammanundan, hvussu úrslitið skal vera sigur rektarin við Útvarpið.

Uppá fyrispurning um tað er farið óheppið fram og um nakað kundi verið gjørt øðrvísi sigur rektarin, at sjálvandi kundi tað tað. –Arbeiðið fór í gongd við tí ætlan, at tað skuldi skrivast ein frágreiðing, og so kom tað í drag. Haraftrat komu ymsir samskiftistrupulleikar og hvørt av sínum, so tað varð útsett. Tað hevur ikki gingið, sum tað skuldi, og tað eri eg sera kedd av. Men gjørd gerð far onga vend, og vit mugu taka við læru av hesum og síggja til eina aðruferð at hava betri skil á tí, sigur Malan Marnersdóttur við útvarpið og sigur í sama viðfangi, at hon er sera spent at síggja frágreiðingina.

Rektarin á Fróðskaparsetrinum sigur annars at tað er álvarsligt, tá spurnartekin verður sett við virksemi hjá Setrinum í løgtinginum og vísir til, at landsstýrismaðurin í mentamálum skal svara spurningum um Setrið og Menas oa.

-Vit geva landsstýrismanninum teir upplýsingar vit hava. Vit hava sent honum nakað, og vit eru altíð til reiðar at koma við fleiri upplýsingum sigur hon.

Uppá fyrispurning nær Menasfrágreingin kemur sigur Malan Marnersdóttir seg vóna, at hon kemur skjótt, tí orðaskiftið um hetta málið er farið so langt av leið, at hon nú kundi hugsað sær, at tað fór at snúgva seg um tað, sum stendur í frágreiðingini.



*Mistøk eru gjørd í sambandi við Menasfrágreiðingina, men tey verða ikki endurtikin og at siga, at Fróðskaparsetrið er endað í lummanum á einum oljufelag er at taka munnin ov fullan, sigur Malan Marnersdóttur, rektari á Fróðskaparsetri Føroya*



# Pjerrot undirhelt

UNDIRHALD

Seinnapartin týsdagin var víðagitni danski klovnurin, Pjerrot, á palli í SMS. Við sínum hvíta búna, hvíta andliti, og stóra, breiða reyða smíli undirhelt hann børnum og vaksnum eina løtu. Klovnurin hevði sjálvur tikið pall við úr Danmark, og hann framførdi brot úr teimum ymsu leikunum hann vanliga framførir á Bakkanum, sum er elsti undirhaldspallur í Danmark. Heili 202 ár. Klovnurin Pjerrot framførir 150 dagar á rað á Bakkanum, umframt vitjar hann børn á Ríkissjúkrahúsinum, ið hava krabbamein, har hann undirheldur fyri teimum. Við Rás 2 týsdagin segði Pjerrot, at tá hann sjálvur, hevur mist konu sína til krabbamein, helt hann, at hann eisini skuldi geva eitt sindur av lívsvirði til hesi børnini.

Børnini og tey vaksnu tóku væl ímóti danska klovninum. Ein rættur barnaelskari. Pjerrot segði, at klovnurin er eitt sindur býttari enn børnini, og tí hevur hann brúk fyri teirra hjálp, og á henda hátt fær hann sympati frá børnunum.

Pjerrot og børnini hóskaðu bara væl saman. Uttan iva eitt væleydnað tiltak á Torginum í SMS.

*-ib*




# Góður útróður á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Útróðrarbátarnir, sum avreiða á Sandi, hava havt góðan fiskiskap seinastu tíðina. Hetta er háveturstíð, so dagarnir eru skiftandi til veður. Men tá ið roynandi er, liggur væl fyri.

Á Sandi siga tey, at nógvur fiskur hevur verið at fingið við línu og teir, sum royna við snellu, hava eisini gjørt góðar dagar.

– Ein útróðrarbátur úr Havn avreiddi á Sandi tríggjar ferðir í síðstu viku. Hetta vóru tríggir ógvuliga góðir útróðrardagar, ávikavist 12.000, 9.000 og 6.000 pund. Teir settu 20 stampar hvørja ferð.

Aðrir bátar hava eisini fingið væl við línu. Teir, sum royna við snellu, hava ligið uppí 1800 pund, og tá er vanliga bara ein maður á hvørjum báti.Á Sandi siga tey, at meginparturin av veiðini hjá útróðrarbátunum er gráur fiskur, men royna teir longur úti á, fæst eisini nakað av góðari hýsu á línu.

### Kolumbus og Nornagestur

Partrolararnir, Kolumbus og Nornagestur, seldu ætlandi um uppboðssøluna í gjár. Sandoy Seafood plagar at keypa veiðina hjá teimum, men tá ið vit frættu av Sandi týsmorgunin, var lastin ikki seld. So, ikki var heilt vist, hvar skipini leggja veiðina upp hesaferð.

Mánadagin høvdu Kolumbus og Nornagestur umleið 200.000 pund inni, meginparturin upsi.

Tey vóru til arbeiðis á Sandoy Seafood mánadagin og týsdagin, og væntandi verður arbeitt alla hesa vikuna.

Sum skilst, hevur felagið keypt væl av hýsu á uppboðssølu seinastu tíðina. Hýsan verður skorin til flak í Skopun.

Av útróðrarfiskinum verður toskur 5 skorin í Skopun. Restin verður flakt og saltað á virkinum á Sandi.

